

*Hundatenn eru ofta plágaðar av nógvum tannsteini, og enda tí hjá djóralæknanum, sum hevur serliga útgerð til at sleppa av við tannsteinin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Golden Retriever og Labradorar, eru teir vanligastu hundarnir í dag smáir, so sum Chihuahua.

– Tað, sum er hent við Chihuahua rasuni, er ein bein selektión, sum hevur víst seg at rigga væl við júst hundum.

Teir hava líka sum øll hini djórini í Føroyum tørv á hjálp frá lækna av og á, og tað er skyldan hjá djóralæknanum.

- Fyri tað mesta er tað passaligt við arbeiði hjá okkum. Onkrar tíðir á árinum er meir at gera. Til dømis, tá lembingin er fyri, og ærnar fáa mjólkafebur.

Tað er eisini ein uppgáva hjá djóralæknanum at kanna um ein kúgv er kviðin. Ein bóndi biður um eina slíka kanning fyri at vita um kúgvin kann væntast at mjólka. At avhorna kálvar er eisini vanligt arbeiði fyri djóralæknan, og hevur ein kúgv trupulleikar av at kálva, verður djóralæknin ofta tilkallaður.

- Ein gelding er ein vanlig skurðviðgerð hjá okkum. Tíkar verða ofta sproytaðar fimta hvønn mánaða við hormonum fyri ikki at ganga á illum, men alt fleiri velja gelding, tí hjáárin eru við hormonviðgerðini. Og so koma hundar eisini regluliga inn til koppseting, sum teir skulu hava triðja hvørt ár, sigur Bergur Hanusson.

## Eitt djór er ein íløga

Ein partur av arbeiðnum hjá djóralæknanum kann avgreiðast umvegis telefonina. Hesa løtuna, vit sita og práta um arbeiðið hjá djóralæknanum, ringir telefonin títt. Fleiri av teimum, ið ringja, standa og mangla onkran heilivág til djórini, sum er átrokandi. Júst sum ein veruligur lækni, skrivar djóralæknin eina resept, sum so kann heintast á einum av apotekunum í landinum.

- Eg haldi, at fólk fyri tað mesta eru góð við síni djór. Tað er ein íløga, tey gera í at fáa sær dýrar hundar, og tí skulu teir eisini røktast væl, sigur Bergur Hanusson.

Sum við øllum øðrum størvum, fylgjast góðu og keðiligu uppgávurnar at. Tað hendir ikki so sjáldan, at djóralæknin sleppur at royna seg, tí okkurt óvanligt stingst uppá. Her fyri noyddist Bergur Hanusson at leggja eina kettu undir skurð, sum hevði svølgt eina nál. Hann tekur røntgumyndirnar fram, og vísir hvussu kettan sá út innaní. Veit ikki hvat sjokerar yviritaðu meir, at kettan hevur sín egna journal ella hvussu góð útgerðin er til at kanna djórini. Harafturat hevur ein mynd av eini sjáldsamari uglu, sum Bergur hjálpti fyri nøkrum árum síðani, fingið serligt pláss á uppslagstalvuni, og hann reksar upp av óvanligum djórum, hann hevur verið noyddur at hjálpt gjøgnum tíðina, so sum eini pungrottu, eini slangu, einum fuglaeiturkoppi, og ikki at gloyma lama'irnar í Hvalba, ið her fyri lembdu.

- Tað er spennandi at sleppa at royna seg. Soleiðis kennir ein, at menning alla tíðina er í arbeiðnum. Skal eg nevna nakrar av teimum keðiligu uppgávunum hjá okkum, er tað at avlíva frískar hundar, og at meta um djóraplágarí, eru hann og starvsfelagarnir á einum máli um.

## Krematoriið á Sandvíkahjalla

Og hvat gera djóralæknarnir við deyðu kropparnar?

- Teir koyra vit niðan á Sandvíkahjalla. Nú er tað av ymsum orsøkum, at fólk velja av avlíva síni djór, men snýr tað seg til dømis um ein gamlan hund, tekur eigarin hann ofta við heim og jarðar hann í garðinum hjá sær sjálvum. Í øðrum førum eru tað vit, ið taka okkum av kroppunum, og koyra teir niðan á brennistøðina, sigur djóralæknin.

Djóralæknatænastan við Varðagøtu er sera væl útgjørd við rúmligari skurðstovu og allari nýmótans tøkni. Her verða djórini doyvd áðrenn skurðviðgerð, og við nýtslu av tólunum, verður ansað eftir at djórini hava tað gott, meðan skurðviðgerðin verður framd. Tveir djóralæknar eru altíð til staðar, tá ein skurðviðgerð fer fram. Her eru eisini tól til at reinsa tenn við.

- Hundatenn eru ofta plágaðar av nógvum tannsteini, sum ikki fæst burtur uttan við hjálp av eini slíkari maskinu, sigur Bergur.

Á niðaru hædd er røntgen og myrkakamar, og í eini frystiboks liggja deyðir kroppar, sum djóralæknarnir skiftast um at beina fyri. Í einum av rúmunum situr ein kvinna og klippir sínum puddil hundi. Hon var noydd til at doyva hann fyri at fáa hann kliptan.

- Tað kemur fyri, at hundarnir kenna seg aftur her hjá okkum, og kunnu finna uppá at verða bangnir og goyggja at okkum, sigur djóralæknin og smílist.

## At lekja er avgerandi

Áhugin millum fólk fyri djórum er stórur. Djóralæknatænastan hevur til dømis altíð praktikantar í starvi, tá tann tíðin er, og ofta er kapping um plássini.

Enn er grundarlag ikki fyri at byggja eitt veruligt djórahospital, sum vit síggja í londunum kring okkum. Djóralæknatænastan við Varðagøtu er væl fyri og bygd upp av núverandi djóralæknum. At byrja við var lítið av tekniskari útgerð, men í dag er útgerðin so mikið góð, at einki djór noyðist at ganga við pínu.

- Orsøkin til at eg valdi at fara at lesa til djóralækna, var hugurin til at hjálpa, lekja ella bjarga. Mær dámdi altíð væl djór, hóast eg ikki eri uppvaksin við djórum í heiminum. Eg minnist, at eg skuldi raðfesta míni ynski um útbúgving, og eg valdi djóralækna sum nummar eitt, lækna sum nummar tvey og tannlækna sum nummar trý, greiðir Bergur Hanusson frá.

Og hann er fegin um at hann fekk sítt fremsta ynski uppfylt.

- Hetta arbeiðið verður ongantíð rutina. Ein lærir alla tíðina nakað nýtt.